# Vil hava norðmenn og íslendingar upp í ES

**Franz Fischler, ES landbúnaðar og fiskivinnu kommisserur, vil hava Noreg og Ísland sum limir í ES - og meinar at fiskivinnu politikkur ikki nýtist at vera nøkur størri forðing**

FISKIVINNA
*Búi Tyril*
*tyril@PRnewsMedia.com*

Í sambandi við at tíggju eystur- og miðeuropeisk lond í mai gerast nýggir limir í ES, dylir landbúnaðar og fiskivinnu kommisserurin í Brüssel, Franz Fischler, ikki fyri sínum vónum um at ES eisini veksur vestureftir, umframt at eisini fáa tað miðeurpeiska Sveits við í limaskaran.

»Eg haldi tað hevði verið flott við einari víðkan, ikki bert eystureftir, men eisini vestureftir,« segði Fischler við norska IntraFish.

»Vit hava longu traditión fyri samstarvi við Ísland og Noreg hvat viðvíkur umsiting av felags fiskastovnum,« legði ES kommisserurin afturat.

Meðan hann viðgekk at fiskivinnan í Noreg og Íslandi aftrar seg við at taka fiskivinnu politikkin hjá ES til sín, so heldur hann kortini at hetta ikki er nøkur óyvirkomilig forðing.

»Eftir mínum tykki er tað (…) nógvar orsøkir til at tey ikki eru limir. Tað verður ov einfalt at siga at fiskivinnan er orsøkin. Ein skal heldur ikki gloyma at norðmenn sjálvir nýskipa sín egna fiskivinnu politikk og innføra strangari tiltøk fyri at varðveita stovnarnar. So eg dugi ikki at síggja at hetta skal vera nakað størri hindur í framtíðar samráðingum við Noreg.«

Hóast fiskivinnu samráðingarnar í fjør millum Noreg og ES stóðu fastar í fleiri vikur, so sær Fischler sambært IntraFish heldur ikki hetta sum tekin um vaksandi ósemju um hvussu stovnarnir skulu umsitast. Hann meinti at tað er ein spurningur um at báðir partar skulu hava tíð til at finna sínar positiónir.

»Tað er greitt at báðir partar mugu síggja um síni egnu áhugamál, og tryggja at hesi hava størst møguliga pláss í einari endaligari avtalu. Viðhvørt tekur tað bara longri tíð. Eg haldi at vit at enda koma fram til eina góða semju… Vit skulu minnast til at hetta er ikki nøkur gøta fyri einvegis ferðslu; norðmenn sleppa at fiska í okkara farvatni, júst sum vit sleppa at fiska í teirra. Spurningurin er altíð: Hava vit javnvág millum kvoturnar vit geva og kvoturnar vit fáa?«

Einki varð nevnt um Føroyar; hinvegin varð Ísland, hóast tummilin hjá kommisserinum í tí sambandinum peikaði nakað niðari enn hann gjørdi fyri Noreg, umtalað sum eitt møguligt framtíðar ES limaland.

»Við Íslandi eru kanska fleiri ósemjupunkt. Vit hava trupulleikar við at teir aftur eru farnir undir hvalaveiði. Vit koma framvegis at vera ímóti henni. Harafturat hava teir opinbert eina heilt aðra skipan fyri umsiting av fiskivinnuni. Trupulleikin er hvussu vit kunnu viðgera munirnar í okkara skipanum. Tað hevði verið ómøguligt fyri ES at gjørt broytingar, og intro-dusera ta íslendsku skipanina, bara fyri at fáa Ísland at koma upp í ES. So teir mugu broyta sína skipan. Men styrkin hjá Samveldinum er flexibiliteturin. Vit eiga at vera flexibul og kanna hvussu vit kunnu møta teirra serligu krøvum. Tað er soleiðis skipanin eigur at vera.«

# Nú skal Suðuroy fáast á føtur aftur



*Fiskur úr Russlandi kastaði nógv arbeiði av sær á føroyskum virkjum fyri nøkrum árum síðani. Nú kann tað eisini henda, at tað verður russarafiskurin, sum verður álitið hjá fólkinum í syðru helvt í Suðuroy. Ein møguleiki er, at arbeiða russarafisk á stóra flakavirkinum í Vági*

**Samgongan er í ferð við at seta ein bólk at kanna, hvussu gongd aftur kann fáast á vinnulívið í Suðuroynni**

VINNUFRAMI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

**Suðuroy:** Nú skal gongd fáast á vinnulívið í Suðuroynni aftur.

Tað ætlar samgongan.

Serliga í syðru helvt í Suðuroy er bara gingið afturá seinastu tíðina og eitt virki fyri og annað eftir er steðgað og á øðrum virkjum er nógv minni arbeiði, enn tað hevur verið.

Og í løtuni er støðan í syðru bygdunum í Suðuroy ikki mætari enn hon var fyri 10-12 árum síðani, tá ið kreppan leikaði uppá tað harðasta.

Fleiri ferðir hevur verið sóknast eftir eini miðvísari, politiskari ætlan fyri, hvussu vinnulívið í hesum partinum av landinum kundi fáast á føtur aftur, á sama hátt sum Sandoyarætlanin lyfti Sandoynna upp úr aldudalinum og upp á eitt hægri støði.

Og nú hevur hendan samgongan raðfest málið so mikið ovaliga, at ein serstakur bólkur skal nú setast at kanna eftir, hvussu vinnulívið í Suðuroynni skal fáast á føtur aftur.

## Suðuroyarbólkur skal stinga út í kortið

Johan Dahl, løgtingsmaður fyri sambandsflokkin, upplýsir fyri Sosialinum, at ætlanin er at seta ein bólk við tinglimum úr teimum trimum samgonguflokkunum. Limirnir hjá sambandsflokkinum og javnaðarflokkinum í bólkinum verða úr Suðuroynni, men limurin hjá fólkaflokkinum verður onkra aðrastaðni frá, tí hann hevur ongan tinglim úr Suðuroynni.

Hesin bólkurin skal so hava tætt samband við vinnulív og onnur serkøn í Suðuroynni.

– Saman við restini av samgonguni og vinnulívinum í Suðuroynni skal hesin bólkur so stinga út í kortið, hvussu oyggin kann fáast á føtur aftur og fáa greiði á, hvat skal til, fyri at fáa gongd á vinnulívið aftur.

Johan Dahl sigur, at nevndin skal arbeiða skjótt, tí tað krevjast skjótar loysnir.

Hann heldur, at verða ikki tiltøk sett í verk, kunnu vit gloyma alt um økismenning.

Hann heldur, at politiskt hevur tað verið alt ov lítil áhugi fyri støðuni í útjaðaranum í Føroyum.

–Tað vísir seg sum um at tað hevur verið ov lítil áhugi fyri at loysa trupulleikarnar hjá útjaðaranum og nú mugu politikararnir gera upp við seg sjálvar, um vit skulu hava ein útjaðara í Føroyum ella ikki.

Hann vísir á, at tað er dýrari at reka vinnu í útjaðaranum og tí er búseting og trivnaður í útjaðaranum ikki nakað, sum kemur av sær sjálvum.

– Eitt nú er tað dýrari at fáa vørur til og frá virkjum í útjaðaranum enn til og frá virkjum í miðstaðarøkinum og tað er eisini dýrari at seta vinnu á stovn í útjaðaranum, tí peningastovnarir taka hægri rentu fyri at fíggja virkisbygningar í útjaðaranum, tí virðini eru minni og sostatt eisindi vandi fyri tapi, størri.

Og Johan Dahl er sannførdur um, at skal vinnan í útjaðaranum fáast á føtur aftur, skulu politiskar loysnir til.

– Er ikki vilji til at taka tey politisku stigini, sum eru neyðug, kann tað gera tað sama.

## Russarafiskur ein møguleiki

Í hesum sambandi nevnir Johan Dahl, at ein møguleiki kundi verið gjørt eina skipan, so at tað bar til at arbeitt russarafisk í Vági.

Í Sosialinum herfyri helt Meinhard Jacobsen, stjóri í Fiskavirking, at ein gongd leið fyri at fingið støðugt arbeiði í Vági, var at keypt frystan fisk úr Russlandi at virka á virkinum í Vági.

– Tað gevur nógv og støðugt arbeiði, segði Meinhard Jacobsen.

Men hann legði eisini dent á, at skal tað bera til, er tað ein fortreyt, at skipanin við tollendurgjaldi verður sett í verk aftur.

Fyri nøkrum árum síðani fingu virki 1,10 krónur í tollendurgjaldi fyri kilo av ráfiski, sum varð keypt úr Russlandi. Tað var ein skipan, sum skapti heilt nógv arbeiði, segði stjórin í Fiskavirking, men við ongum tollendurgjaldi, verður tað ov dýrt.

Johan Dahl sigur, at tað stuttu tíð, hann sat sum fiskimálaráðharri, hevði hann ein stuttan óformligan fund við stjóran í Fiskavirking, og har var hesin møguleikin við russarafiski nevndur.

– Eg haldi, at í fyrsta umfari í hvussu so er, er russarafiskurin loysnin fyri Vág, tí hann skapar støðugt arbeiði og tað er støðugt arbeiði, sum fólk mest av øllum hava brúk fyri.

## Eitt gott hugskot

Tollendurgjaldið er eitt endurgjald fyri tað, sum virki gjalda meiri í tolli fyri at selja triðjalands fisk í ES.

Og tað tykist sum um at júst russarafiskurin kann verða álitið hjá suðuroyingum framyvir, tí tað tykist sum um at tað eisini eru onnur í samgonguni, sum halda, at tað kann vera ein gongd leið at seta skipanina við tollendurgjaldi í gildi aftur.

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, sigur, at tankin er avgjørt áhugaverdur.

– Tað skapar nógv arbeiði og verður úrslitið, at landskassin fær nógv størri inntøkur av hesum enn hann letur í tollendurgjaldi, er tað avgjørt áhugavert.

Hann heldur eisini, at støðan í syðru helvt í Suðuroy er so vánalig, at tað verður neyðugt at seta óvanlig tiltøk í verk.

– Kemur tað so langt, ivist eg ikki í, at landsstýrið fer at viðgera tað við áhuga, sigur løgmaður.

Somuleiðis heldur Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, at hetta avgjørt er ein góð ætlan, sum hann eisini er sinnaður at arbeiða víðari við.



# Andstøðan samd

**Størstu broytingarnar higartil í nýggja valskeiðnum tykjast vera tær broytingar, sum eru framdar í miðfyrisitingini. Aðalráðini eru skerd frá níggju niður í sjey, og av hesum hava aðalstjórar og starvsfólk verið flutt runt á ymsu ráðunum. Andstøðuleiðararnir eru samdir um, at skerjingarnar í miðfyrisitingini als ikki tæna nøkrum endamálið. Tíverri fingu vit ikki viðmerking frá Kára P. Højgaard áðrenn evstamark**

Høgni Hoydal:

## Spæl fyri gallarínum

**– Við broytingunum í miðfyrisitingini hevur samgongan í veruleikanum bert flutt runt á einum fótbóltsliði og fingið eina kabal at ganga upp, uttan at nakað endamál og nøkur ætlan er at hóma, heldur Høgni Hoydal um skerjingarnar av aðalráðum**

SKERJINGAR
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



*– Økið hjá løgmanni er sambært stýrisskipanarlógini frammanundan so stórt, at løgmaður als ikki átti at savna uttanríkismálini undir seg sjálvan. Tískil skuldi ein uttanríkisráðharri verið settur við egnum aðalráði, mælir Høgni Hoydal til*

Formaður Tjóðveldisfloksins í andstøðu, Høgni Hoydal, eftirlýsir og saknar eina endurskoðan á allari fyrisitingini. Hann heldur, at skerjingarnar í aðalráðunum ikki er annað enn eitt spæl fyri gallarínum, har nøkur vallyfti skulu haldast, uttan at nøkur verulig ætlan er aftanfyri.

– Man hevur flutt runt uppá nakrar brikkar í aðalráðunum uttan nakrar sparingar, og tað verða so ikki hesar broytingarnar, sum síggjast aftur á eini fíggjarlóg, heldur Høgni Hoydal. Hann saknar verulig endamál við broytingunum, og mælir hann til endurskoðan í øllum bygnaðinum.

– Neyðugt er at spyrja, hvat vit veruliga vilja við miðfyrisitingini. Hvat er ætlanin, endamálið og visiónirnar, og í hesum sambandi skuldi ein bólkur verið settur við kvalifiseraðum fólki at kanna, hvussu samstarv millum aðalráðini verður sett í hásætið, heldur Høgni Hoydal. Fyrrverandi varaløgmaður leggur dent á, at tað ikki snýr seg um tal av aðalráðum, men heldur um hvussu samstarv kann fáast millum ráðini uttan nakrar dupultfunktiónir.

– Tískil skuldi fyrisitingarbygnaðurin verið endurskoðaður heldur enn at flyta runt uppá nøkur ráð og nakrar aðalstjórar uttan endamál, sigur formaður Tjóðveldisfloksins.

### Brúk fyri uttanríkisráðharra

Høgni Hoydal stuðlar tó samgonguni í at styrkja um føroysku uttanríkisfyrisitingina, sum samgongan júst hevur lagt undir Uttanlandsdeildina í Løgmálaráðnum, men metir hann, at brúk er fyri einum uttanríkisráðharra, sum í staðin fyri løgmann umsitir uttanríkismálini.

– Økið hjá løgmanni er sambært stýrisskipanarlógini frammanundan so stórt, at løgmaður als ikki átti at savna hetta undir seg sjálvan. Tískil skuldi ein uttanríkisráðharri verið settur við egnum aðalráði, mælir Høgni Hoydal til. Hann leggur afturat, at um uttanríkismálini endiliga skulu vera undir løgmanni, kundu Vinnumálaráðið og Fiskimálaráðið eisini verið løgd saman.

– Men tað avgerandi er sum sagt ikki, hvussu nógv aðalráð eru, men heldur, hvussu samstarvið millum ráðini kann samskipast effektivt. Samgongan hevur flutt runt uppá eitt fótbóltslið, men spurningurin er, hvussu liðið fær spælt saman, tí í løtuni eru nógvar dupultfunktiónir, slær Høgni Hoydal fast. Sambært honum er ein sjálvsøgd fortreyt fyri sparingum, at broytingar vera í sjálvum bygnaðinum, og tískil hava núverandi broytingar als einki endamál.

– Løgfrøðingar, fíggjarstýrið og EDV kunnu t.d. saktans samskipast millum øll aðalráðini í einum øðrvísi samstarvi, í staðin fyri at hvørt aðalráð hevur sínar løgfrøðingar, fíggjarfrøðingar o.s.fr, sigur Høgni Hoydal.

Endamálið eigur sambært formanni Tjóðveldisfloksins at vera at fáa meiri burturúr samstarvinum millum tey mongu dugnaligu starvsfólkini í staðin fyri bert at flyta runt á yvirflatuni.

– Endurskoðanin av bygnaðinum er nakað, vit ikki megnaðu at koma til í gomlu samgonguni, og tað er harmiligt, at nýggja samgongan heldur ikki hevur fingið viðgjørt spurningin, heldur Høgni Hoydal at enda.

Jenis av Rana:

## Synd í Hans Paula

**– Tað einasta, samgongan hevur fingið burturúr skerjingunum í miðfyrisitingini, er eina veikari politiska ávirkan uttan nakrar sparingar, sigur Jenis av Rana. Formaður Miðfloksins ávarar eisini samanleggingina av almanna- og heilsumálum, sum eri eitt alt ov stórt øki til ein landsstýrismann**

SKERJINGAR
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



*– Tveir landsstýrismenn eru sendir heim, og tað hevur sjálvsagt elvt til eina viknaða politiska stýring og eitt sterkari embætisverk, har landssstýrismenninir ikki hava møguleikan fyri sama innliti og yvirliti samanborið við undanfarnu samgongu, sigur Jenis av Rana*

– Tað stóð í yvirskrift í bløðunum ein dagin, at fyrstu vallyftini eru brotin, og tað er júst tað, sum er hent, sigur ein av andstøðuleiðarunum, Jenis av Rana. Hann vísir á, at skerjingar skuldu gerast við endamálinum at spara, og tá tað ikki er hent, er einki vunnið.

– Tveir landsstýrismenn eru sendir heim, og tað hevur sjálvsagt elvt til eina viknaða politiska stýring og eitt sterkari embætisverk, har landssstýrismenninir ikki hava møguleikan fyri sama innliti og yvirliti samanborið við undanfarnu samgongu, sigur Jenis av Rana.

### Hans Pauli ongan kjans

Jenis av Rana er hart ímóti, at almanna- og heilsumál aftur komu undir eitt aðalráð, og vísir hann á, at viðkomandi landssýrismaður Hans Pauli Strøm als ikki hevur møguleikan at umsita stóra økið einsamallur. Tað var orsøkin til, at Páll á Reynatúgvu og Bill Justinussen í undanfarnu samgongu býttu økið ímillum sín.

– Í staðin fyri at skapa møguleikar fyri visiónum og menningarætlanum, fer Hans Pauli bert at sløkkja eldar, tí hann stutt sagt ikki kann hava yvirskot til annað, sigur Jenis av Rana. Hann undirstrikar, at Hans Pauli Strøm er ein sera dugnaligur, arbeiðssamur og nærlagdur politikari, men at almanna- og heilsumál einfalt er ov stórt fyri ein politikara at umsita.

– Tískil er tað á ein hátt synd í Hans Paula, og samgongan kemur at sanna, at samanleggingin av almanna- og heilsumálum var skeiv, eins og teir nú hava innsæð, at ætlanirnar um sparingar heldur ikki hildu, vísir formaður Miðfloksins á.

### Vælferðarsamfelagið er dýrt

Jenis av Rana trýr ikki løgmanni í útsøgnum hansara um, at við skerjingunum av aðalráðum er nú klárt til víðari sparingar í embætisverkinum.

– Í veruleikanum er einki hent í fyrisitingini, uttan, at nakrar funktiónir í aðalráðunum ikki longur hava eitt politiskt høvd. Annars er støðan júst tann sama, og tá hevur ein ikki ruddað slóð fyri nøkrum, heldur Jenis av Rana. Hann vísir á, at samgongan í staðin skuldi góðtikið, at vælferðarsamfelagið er dýrt, skulu vit halda fast við nakrar grundleggjandi tænastur, og at hann tískil ikki trýr á nakrar sparingar í kjalarvørrinum av teimum broytingum, sum júst eru framdar.

– Frá at vera 42.000 íbúgvar tátta vit nú í 50.000, og tað krevur eisini meiri av fyrisitingini. Tískil kann eg als ikki fylgja løgmanni í ætlanunum um sparingar í framtíðini, heldur Jenis av Rana.